# Miðvikan

Framhald frá síðu 15



*Karl Joensen var 22 ár gamal og forlovaður. Hann var ein av teimum sum fórst*



*Dávur í Gerðum var ein framúr framúr framburðsmaður*

hárini á høvdinum á mær. Eg visti ikki, hvat tað var, hvørki so ella so. Og annan dagin eftir, nú frætta vit um forlissið.

### Hvussu frættu tit tað?

Armgaard, kona Dáva í Gerðum ringdi yvir og segði, at hon hevði fingið telegramm, at Ernestina var forlist, og teir vóru 9 av 26, sum vóru deyðir, men Eliseus livdi enn. Hon visti ikki, hvussu tað bleiv.

### Vistu tey, hvørjir livdi eftir?

Teir vistu, hvørjir vóru deyðir tá. So fekk eg aftur telefonboð seinni um dagin. Armgaard sigur, at nú er ein maður deyður afturat. "Og Gud viti, hvussu hinir mugu hava tað. Eg skal royna at fáa tær boð. Um nøkur góð boð eru, skal eg royna at ringja tey til tín." Morgunin eftir, tá ið eg var uppi, veitst tú, eg hevði einki sovið hesa náttina, sigur gamli Símun Pauli, pápi Eliseus, at hann vildi ikki hopa Eliseus doyði, og at Várharra skuldi vera so óbarmhjertigur at lata seg liva og taka hann úr húsinum. Tú veitst, hvussu menniskjan er. Eg sigi, at "tað má vera, sum Gud vil. Vit eru í hansara hondum, og hann ger við okkum, sum hann vil."

Nú kemur Lena við einum telegrammi til mín. Eg sigi: "Lena, nú eri eg so ússalig, eg havi einki sovið í nátt. Tygum fara ikki út frá mær, fyrrenn eg havi lisið telegrammið". "Jú," sigur hon, "hetta telegrammið kanst tú lesa í frið, tí tað hevur eingi ring boð." Nú er tað Eliseus sjálvur, sum telegraferar: "Eg havi tað gott eftir umstøðunum, men hvussu hava tit tað? Svarið!" Tá vóru teir komnir til Reykjavíkar. Armgaard segði, at teir skuldu koma heim við Dronningini. Teir høvdu biðið hana sett inn í Kalsoyarfirði, so menninir kundu koma hendavegin. Tá er tað Armgaard sigur: "Nú mást tú royna at taka teg saman og koma inn, so vit kunnu taka ímóti teimum, tá ið teir koma, tí tú veitst, hvussu illa teir eru komnir".

Eg skal siga tær tað, at tá ið eg sá hann tað kvøldið, teir komu at landi, tá kom hetta træið fram fyri meg. Hann sjálvur var komin, men hann var ikki í einum klodda av tí, sum eg hevði givið honum, ikki einum einasta einum. Alt var nýtt, sum hann var í, so stammuna hevði eg fingið, men heldur einki annað.

Men tú trýrt ikki, hvussu langt niðri hann var í langar, langar tíðir. Hann svav ikki og át ikki. Nýra og alt var fyrigingið. Og tað eri eg klár yvir, at nýrað er blivið sjúkt tá. Tað hevur verið kroyst upp á eitt ella annað umráði. Hann segði eisini altíð, at beinið var stívt og fylgdi ikki við, tí hann hevði ligið undir bátinum. Teir fingu ein sjógv, og báturin holvdist út yvir fleiri, og hann var ein av teimum. Tað var redningsbáturin, teir høvdu við. Teir skuldu royna at draga hann fram ímóti gronini. Ein fylling kom, og hann holvdist út yvir teir og brotnaði sundur. Hann segði, at tveir tjørnuvíkingar, pápi og sonur, fórust báðir, doyðu upp á staðið. Ein úr Kunoy, sum æt Rasmus, hann bløddi bæði gjøgnum nøs og munn og allastaðni, so forsvann hann. Teir vistu ikki, hvussu hann fór. Tá hevur Eliseus fingið ein stoyt, tí hann segði, at tað var sum alt doyði. Altíð var hann ísakaldur sum gler, og tað var allan vegin ígjøgnum heilt upp undir herðarnar.

### Tosaði hann nakað um tað í fyrstani?

At begynna við segði hann einki, bað meg vælsignaðan ikki snakka við seg. Hann hoyrdi skríggini frá teimum enn, hoyrdi neyðarrópini. Hann segði, at hann mátti siga, tað var ofta soleiðis, at tá ið ein tagnaði, doyði, vóru teir glaðir yvir, at so hoyrdu teir ikki tað skriggið. So tú kanst ætla, tað hevur verið ein forferdilig neyð, teir hava verið í. Tað var so leingi, góða, frá klokkan tíggju um kvøldið. Ikki komu teir til fólk fyrrenn klokkan tvey dagin eftir við ongum bita og ongum nøkrum. Ísakaldir! Og so komu teir enntá til køld hús og eingi klæðir. Men tað er, sum langabbi tín segði: "Menniskjan kann útstanda nógv, áðrenn tað doyr".

### Einastandandi frásøgn

Henda frásøgnin er enn ein nemandi frásøgn um ta ræðuligu støðu manningin á Ernestinu var í. Men hon er eisini ein framúr frásøgn um, hvussu tey heima upplivdu hetta. Tí er hetta enn eitt íkast til lagnusøguna hjá føroyska fiskimanninum.

### Báðar arbeiðsgenturnar hjá Gudrun Zachariassen høvdu drong við Ernestinu

Í Jólaboð hevur í fleiri ár verið ein frásøgn hjá Gudrun Zachariassen, sum var gift við amtslæknanum Jógvan Zachariassen. Hon greiðir frá mongum áhugaverdum eisini syrgiligum hendingum. Hon kom so eisini at uppliva hendingina við Ernestinu á ein serligan hátt. Eftir at hava greitt frá eini aðrari vanlukku skrivar hon í Jólaboð 2007:

Enn ræðuligari var kortini, tá ið boðini komu, at Ernestina var burturgingin. Tann vakra franska skonnartin, ið fá ár frammanundan, sum tað fyrsta skipið av tí slagnum, var komin á Klaksvík. Vit minnast ta vøkru sjónina, tá ið hon á veg á Klaksvík fór um Klakkin. Tað var veruliga ikki til at skilja. Hon var í stormi og óveðri strandað á Íslands klettum, og menn, sum vit øll kendu, vóru deyðir har uppi. Nakrir vóru bjargaðir í land. Ein av teimum bestu svimjarum svam í land við eini línu, sum teir høvdu fest í eina mastur og eftir línuni eydnaðis teimum at koma í land, meðan hinir, ið høvdu komið sær uppá lúnningina, frystu so við og við í hel ella duttu í havið.

Tigandi og djúpt hugsunarsom gjørdust fólk, tá ið tey fingu boðini. Øll kendu álvarsemið at vera løgd undir eitt sterkari vald, eina lagnu tey ikki fingu steðgað. Vanlukkan rakti eisini okkara heim. Dreingirnir hjá báðum teimum ungu gentunum, sum arbeiddu hjá okkum, vóru við. Annar var millum teir bjargaðu, hin doyði har. Tað vóru ring boð at bera henni, sum misti. Men vit kundu ikki broyta lagnuna, tað mátti verða sagt henni. Á, sum eg fegin vildi havt tikið hana inn at mær og borið henni eitt troystarorð. Men orð míni gjørdust fátæk og óhjálpin at síggja hana, sum annars var so fitt og glað, at fáa eina so harða og miskunnarleysa lagnu.



*Nikolina misti pápan í 1932 við Lauru. Torleif kundi eins væl mist sín pápa við Ernestinu*

Dreinginir vóru Erik Lassen, sum bjargaðist, og Karl Joensen, í Gerðum, sum gjørdist 22 ára gamal.

Erik Lassen giftist í 1932 við Johonnu Sofíu, og tey fingu eitt langt lív saman. Hin gentan, Andrea, giftist seinni við Símun Dávur Kalsø, sum var ein kendur skipari av Syðradali í Kalsoynni. Andrea var dóttir Jógvan Segl. Hon var fødd í 1907 og doyði longu í 1962.

Her kann verða skoytt uppí, at Erik Lassen greiddi frá í fyrsta partinum, at tá ið hann kom til Reykjavíkar aftaná forlissið, helt hann til hjá eini grannakonu úr Klaksvík, sum búði í Reykjavík. Hetta var Maria f. Petersen, dóttir Johannu og Petur Samuelsen, bakari, ættaður úr Horni í Havn. Maria giftist til Reykjavíkar við Trausti Olafsson, sum var professari við Háskóla Íslands.

Dóttir teirra Ása giftist til Føroya við Finn Winther. Hon er fødd í 1922 og minnist hetta væl. Tað komu fleiri av manningini á Ernestinu heim til teirra, og serliga minnist hon teir práta um Jógvan Thomassen, sum doyði á landi. Ása greiðir somuleiðis frá, at tað eisini í aðrar mátar ofta komu føroyingar heim til teirra.

### Hildu um hvønn annan inni hjá Ziska

Ìsak Justinussen úr Árnafirði var við Ernestinu og yvirlivdi. Á samkomuni í Reykjavík í 2000 greiddi Torleif, sonur Ísak, frá barnaminnum, sum kundu setast í samband við hesa hending. Eina ferð sum smádrongur var hann saman við pápa sínum í Klaksvík í grind. Teir fóru inn til Ziska. Tá ið Torleif einaferð hyggur inn í stovuna, undrast hann yvir at síggja fýra mans sita og halda um hvønn annnan sitandi púra kúrrir og hyggja fram fyri seg. Tá vóru tað skipsfelagar frá Ernestine, sum sótu og mintust hesa lagnustundina.

Pápi Torleif fortaldi eisini eitt ítøkiligt dømi um sannleikan av orðatakinum "knívleysur er lívleysur". Teir hingu fleiri av manningini uppi í mastrini, har seglið framvegis var uppi. Men so nógv stóð á mastrini orsakað av tí nógva vindinum, at teir ivaðust ikki í, at fingu teir ikki kvett línuna, sum helt seglinum uppi, so fór øll masturin og fleiri mans við henni. Men hetta eydnaðist so at kvetta línuna, tí onkur hevði kniv uppi á sær.

Torleif greiddi eisini frá hinum árnfirðinginum, Kristoffuri Olsen. Hann fór aftur við Skálanesi við sama skipara fyrsta árið hjá skipinum. Men tá gavst hann at sigla og fór at rógva út. Hann vildi nevniliga ikki fara so langt frá landi, at hann ikki sá land. Tí vildi hann ikki fara við ferðamannaskipi av landinum. Soleiðis ávirkaði henda hending hann.

Thorleif er giftur við Nicolinu f. Lassen úr Vági. Hon er eisini ein partur av lagnusøguni hjá fiskimonnum.

Nicolina var nevniliga júst borin í heim, tá ið hon misti pápan Niklas og pápabeiggjan Niels við Lauru, sum í 1932 gekk burtur samstundis sum Immanuel.

Nicolina varð doypt 27. mai og varð uppkallað eftir pápanum. Niklas hevði grundað fyri húsum, men so stórt var hjálpsemið, at menn í bygdini sjálvboðnir smíðaðu henni húsini liðug.

### Íslendsk frágreiðing

Í Íslandi eru teir so óførir at skriva søgu. Teir skriva eisini um tær mongu skipavanlukkurnar, sum eru hendar undir Íslandi, eisini um tær føroysku.

Íslendski høvundurin Stein